## Stóðu seg væl í OB

Hesi tíðindi ber danska fótbóltsheimasíðan bold.dk. Talan er um Sørmund Kalsø úr KÍ, Jóan Símun Edmundsson úr B68 og Róald Jakobsen hjá B36. Teir hava í vikuni vant við U19-hópinum og unglingahópinum hjá OB, og avrik teirra hava verið sannførandi, sigur Uffe Pedersen, ið er talentstjóri í OB, við heimasíðu felagsins. - Talan er um tríggjar góðar fótbóltsspælarar, ið hóast teirra unga aldur spæla á vaksnamannastøði. Teir hava staðið seg væl, og vit hava fingið eina sera góða mynd av teimum meðan teir hava verið her, sigur Uffe Pedersen. Talentstjórin sigur eisini, at OB heilt víst fer at fylgja ungu monnunum, ið allir eru undir 18 ár, í framtíðini.



## Del Piero skorar framvegis

34 ára gamli Alessandro Del Piero hevur verið flúgvandi seinastu vikurnar, og hann hevur mest sum einsamallur skotið Juventus úr einari kreppu. Í farnu viku skoraði hann bæði málini ímóti Real Madrid í Champions League, og um vikuskiftið skoraði hann fyrra málið, tá vann Juventus 2-0 á útivølli ímóti Chievo. Inter liggur framvegis á odda í Seriu A.

KÍF-Kyndil 25-24 (12-10):

# KÍF á talvuna

**Kyndil hevði munin at kalla allan seinna hálvleik, men seinasta minuttin mistu teir alt á gólvið, soleiðis at KÍF vann sær síni fyrstu stig á árinum**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Botnuppgerð var á skránni í Kollafirði í gjár, har Kyndil var á vitjan.

Undan dystinum hevði KÍF als einki stig at vísa á, meðan Kyndil hinvegin hevði vunnið sær eitt við javnleiki móti StÍF. Umframt hetta hevði Kyndil eisini sýnt stóra leikliga framgongd seinastu dystirnar, og tí var kanska væntandi, at teir grønu veruliga fóru at lætta sær á í gjár.

Tað var tó ikki nógv, sum bendi á hetta fyri steðgin. KÍF var nevnliga støðugt betra liðið fyrstu 30 minuttirnar, men so gekk brádliga púrasta galið.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki setti Kyndil seg nevnliga fullkomuliga á dystin. Tað tók kollfirðingum 10 minuttir at koma á talvuna eftir steðgin, og so hevði Kyndil tikið leiðsluna. Ein leiðslu, sum teir eisini tóktust halda fast um í rótuta dystinum.

Seinastu løtuna kiksaði tó hjá teimum grønu. Kollfirðingar amaðust alt nærri gestunum, og teir skutu seg upp á 23-23, áðrenn Kyndil aftur tók leiðsluna. Tá var bara ein minuttir eftir, men hendan seinasta av slagnum dugdi KÍF altso betur at gera sær dælt av. Og við teimum báðum seinastu málunum í dystinum vunnu teir seg upp á talvuna.



*Alt koppaði í seinasta minuttinum, tá Kyndil misti bæði stigini til KÍF, sum við hesum kom sær av botnsessinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### FAKTA um dystin

**KÍF-Kyndil 25-24 (12-10)**
**10 min:** 4-3
**20 min:** 8-7
**40 min:** 13-15
**50 min:** 18-18
**Málskjúttar**
**KÍF:** Damir Oros 9(1), Andrias Petersen 5, Jákup Trygvason 4, Regin Petersen 2, Teitur Joensen 2, Niklas Reginsson 1, Suni Johannesen 1, Ási Dam
**Kyndil:** Høgni Klein 8, Hans Áki Dal-Christiansen 6(2), Janus Einar Sørensen 3, Andreas Sólsker 2, Jónleif Sólsker 2(1), Ken Zachariassen 2, Bárður Johannesen 1
**Brotskøst:** KÍF 1, Kyndil 4
**Útvísingar:** KÍF 3, Kyndil 4
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen

Stjørnan-Kyndil 33-16 (14-9):

## Væntaði stórsigurin

**Kyndil gav ikki Stjørnuni nakrar trupulleikar yvirhøvur**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var toppur móti botni í Klaksvík sunnudagin. Stjørnan hevur vunnið FM-heitið seinastu trý kappingarárini, og aftur í ár tykist kósin at púrasta óbroytt.

Og móti stigaleysa Kyndli høvdu tær á oddaliðnum als ongar trupulleikar. Fyrstu lítlu løtuna slapp Kyndil at hanga eitt sindur í, men eftir eitt korter setti Stjørnan ferð á. Í verjuni komu tær upp á tærnar at standa, og so fóru tær av álvara at toga seg burtur.

Eftir hetta var einasti spurningurin, hvussu stórur sigurin skuldi verða. Upp á skift royndu skjúttarnir hjá Stjørnuni at fáa sær nøkur mál til máltindin, meðan tað hjá Kyndli einamest ráddi um at fáa tíðina at ganga, so tær kunnu venda tankarnar móti næstu uppgávuni.

### FAKTA um dystin

**Stjørnan-Kyndil 33-16 (14-9)**
**10 min:** 4-3
**20 min:** 7-5
**40 min:** 20-12
**50 min:** 25-13
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 6(1), Una Olsen 6(1), Dianne Møller 6(2), Durita Christophersen 5, Durita Mikkelsen 3(1), Durita Ljósstein 2, Edith Hansen 1, Bára S. Klakstein 1
**Kyndil:** Jacklin Djurhuus 6(1), Barbara Egilstrøð 2, Jórun Ludvig 1, Halla Midjord 1, Annika Poulsen 1, Ronja Mikkelsen 1(1), Beinta Laursen 1, Ása Christiansen 1, Marina Zilko 1
**Brotskøst:** Stjørnan 6, Kyndil 2
**Útvísingar:** Stjørnan 2, Kyndil 1
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

StÍF-Neistin 30-26 (15-11):

# Strandingar hanga í

**Hóast frágongdin hevur verið hampuliga stór, er StÍF framvegis væl við í kappenningini um finalupláss**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan kappingarárinum segði StÍF farvæl við spælarar sum Danny Syhler og David Edvardsen, uttan at nýggir spælarar vórðu keyptir til felagið uttanífrá.

Tí mundu tey flestu hava so hampuliga lítlar vónir til StÍF hetta kappingarárið. Gaman í telur hópurin framvegis nógvar dugnaligar spælarar, og tað kann væl vera, at hetta sum vant fer at røkka til pláss í steypafinaluni. Men í FM-kappenningini hildu tey flestu helst, at strandingar fóru at gerast ov stuttir.

Men tað hava teir so ikki verið higartil. Sæð burtur frá einum svipsara móti Kyndli hevur kósin fyri tað mesta verið sett beint móti oddinum, og har hongur StÍF enn í hølunum á VÍf, hóast munurin aftur til H71 og Neistan bert er eitt stig.

Neistin hevði annars møguleikan at toga seg fram um sunnudagin, tá meistararnir vitjaðu á Skála, men tað var sjáldan líkt til, at teir bláu skuldu hava nakað sum helst við sær.

Hampuliga tíðliga í dystinum togaði StÍF seg tvey-trý mál framum, og hesum høvdu teir at kalla ongan tíð hug at sleppa aftur. Neistin kom heilt nær nakrar ferðir, men tað tókt-ist, sum hevði heimaliðið alla tíðina neyðugu orkuna til at svara aftur, og tá tað veruliga skrædnaði tíðliga í seinna hálvleiki, høvdu meistararnir ikki tað, sum skuldi til fyri at svara aftur.

### FAKTA um dystin

**StÍF-Neistijn 30-26 (15-11)**
**10 min:** 6-4
**20 min:** 10-9
**40 min:** 20-41
**50 min:** 25-20
**Málskjúttar**
**StÍF:** Kári Horn 7, Alexandur Johansen 6(1), Mortan Hansen 6, Bárður B. Danielsen 3, Rúni Johansen 3, Bent Djurhuus 2, Sveinur Justinussen 2, Andre F. Danielsen 1
**Neistin:** Áki Mørk 7(2), Finnur Hansson 5, David Edvardsen 4, Jugoslav Djumic 3, Blagoje Buha 2, Tróndur Kragesteen 2, Magnus Matras 1, Karl Herup Olsen 1, Jens Mohr 1
**Brotskøst:** StÍF 1, Neistin 3
**Útvísingar:** StÍF 2
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen